## Ísfrítt summar í 2050

Á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn hava amerikanskir granskarar staðfest, at broytingarnar í ísviðurskiftunum í økinum kring Norðpólin eru komnar fyri at verða. Granskararnir siga, at tað er vorðið trý stig lýggjari í tí arktiska økinum, og tað er fleiri ferðir meiri enn aðrastaðni. Avleiðingin verður, at ísurin hvørvur, havið fer at fløða, og súgdjór, sum halda til í sjónum, doyggja út. Sambært amerikonsku granskarunum minkar ísurin so skjótt nú, at í 2050 verður summarið í Arktis ísfrítt.



## Ókeypis húsalán í 2010

Umleið 350.000 danskir húseigarar kunnu gleða seg til næsta ár, tí umstøðurnar laga tað so, at tað verður ókeypis at hava húsalán í 2010, skrivar Politiken. Orsøkin er, at realkreditfeløgini hava sett rentuna næsta ár til 1,78 prosent, sum er søguliga lágt. Eitt nú nevnir blaðið, at fólk, sum hava tvær milliónir krónur í avdráttarfríum láni, skulu rinda 2.600 krónur um mánaðin í rentum næsta ár. Men verða skattur og inflasjón drigin frá, kostar húsalánið í veruleikanum einki. Tað vísa útrokningar, sum Politiken hevur fingið frá Realkredit Danmark.

# Kasablanka liggur framvegis

**Tað gongur illa hjá reiðaranum Bjarta Mohr at sleppa av við nótaskipið Hallarklett, sum fyri trimum árum síðan fór undir russiskt flagg og fekk navnið Kasablanka. Skipið liggur mannleyst í Ålesund í Noregi**




*Havnamyndugleikarnir í Ålesund ilskast inn á gamla Hallarklett, sum í hálvt triðja ár hevur ligið svínabundin og harraleysur*
*Mynd: Staale Wattø, Sunnmørsposten*

SKIPAKREPPA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í fleiri londum liggja russiskt skip svínabundin, og eingin vil hava við tey at gera. Reiðaríni eru farin av knóranum, og eingin varar beinleiðis av skipunum.

Eitt føroyskt nótaskip, sum áður sigldi undir føroyskum flaggi við navninum Hallarklettur, má roknast upp í henda harraleysa flota, tí føroyska skipið hevur síðan juli 2007 ligið í Ålesund í Noregi. Skipið varð skrásett í Murmansk undir navninum Kasablanka.

Reiðari er Bjarti Mohr, men hann heldur seg ikki hava ábyrgdina av, at tað gekk, sum tað gekk við Hallarkletti.

- Vit vóru í góðari trúgv, tá ið vit fyri trimum árum síðan, í november 2006, leigaðu skipið út til russiska reiðaríð Bareboat Charter. Alla tíðina hevur reiðaríið ikki goldið okkum eina krónu, sigur Bjarti Mohr. Hann upplivir tað sum, at hann er komin í klemmu, og hann veit, at sama reiðarí skyldar nógvar pengar eisini aðrastaðni.

### Vil hava skipið aftur

- Teir hava verskó at koma aftur við skipinum, gjalda leiguna og í hvussu er gjalda fyri, at tað kann sleppa til fiskiskap aftur. Hatta er eitt deiligt og væl hildið skip, sigur Bjarti Mohr.

Hann hevur í longri tíð roynt at selt skipið, men illa gongur. Nógv tílík skip eru til sølu, keypararnir eru fáir, og torført er at fáa figging.

Sambært Bjarta Mohr er tað ikki rætt, sum áður hevur verið upplýst, at Kasablanka varð tikin í juli 2007 fyri ólógligan fiskiskap. Okkurt var galið við pappírunum. Bótin, sum skipið fekk, var 300.000 norskar krónur, men ta bótina megnaði russiska reiðaríið ikki at gjalda.

- Hetta er ómetaliga harmiligt, og eg má bara siga, at vit eru hart rakt av heimsumfatandi búskaparkreppuni, sigur Bjarti Mohr.

Havnamyndugleikarnir í Ålesund ilskast inn á skipið, sum noyðist at senda fólk umborð tvær ferðir um vikuna. Við norska kringvarpið sigur Birger Flen, havnfúti í Ålesend, at føroyska reiðaríið tykist hava slept endanum. Hann kundi hugsað sær, at skipið varð selt á tvingsilssølu.

Bjarti Mohr er ikki samdur. Hann sigur, at umboðsmaður hansara javnan er umborð, og at hann roynir av øllum alvi at fáa skipið selt.

ART Listagluggin GALLERIE NÝGGJ FRAMSÝNING FRÍGGJADAGIN 11/12

týs. - frí..... 15.00 - 17.30
leyg:......... 11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu !

**Ingálvur av Reyni • S.J. Mikines • Hans Hansen • J. Kampmann • Kruse • Waagstein • Z. Heinesen • Eyðun av Reyni • Astrid Luihn Olivur við Neyst • Torbjørn Olsen • K. Svensson • Rannvá H. Mortensen • Frits Johannesen • Bárður Jákupsson • Øssur Mohr o. fl.**

Virkisøkið hjá ART Gallerie – Listagluggin – er dygdargóð føroysk list. Listagluggin samarbeiðir við best umtóktu listafólkum í Føroyum við at sýna fram og selja list í Føroyum og uttanlands. Málið hjá Listaglugganum er á hollum støði at umboða og breiðum týdningi at vera »sýnisgluggi« úti og heima hjá føroyskari list. Listagluggin vil vera fremstur í sínum øki


Ingálvur av Reyni


Zacharias Heinesen


Torbjørn Olsen


Ingálvur av Reyni

**Listagluggin**
Dr. Jakobsensgøta 15 · Tórshavn
Tlf. 32 20 22 · Fartlf. 51 00 22
listagluggin@hotmail.com · www.listagluggin.com

**Dygdargóð føroysk list!**
Opið hvørja viku – alt árið!

Í samband við komandi framsýning lýsa vit eftir listaverkum – eldri sum nýggjum – eftir viðurkendum listafólkum.
Antin keypa vit listaverkini ella selja vit tey/tað fyri tygum. Setið tygum í samband við okkum fyri at hoyra nærri.